# E - og tónleikurin



**Mikkjal Hvannastein, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Babba hevði eitt orgul einaferð laaangt síðani, sum eg av og á royndi

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– Ja, gittar.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– NEI. Men tá eg koyri bil við rútunum uppi, tá kann eg syngja nokk so hart.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja, næstan hvønn dag.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Aftaná Kristu, alt

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– Eg havi aldrin talt, men eg meini tað má liggja um 100 til 130 fløgur og nøkur kasettu/videobond og ongar plátur.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– Eg havi onga yndisfløgu.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Eg tori ikki at siga tað her.

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Tað eru so nógvir, allir sangir sum hava ósømiligan tekst skuldi aldrin verið skrivaðir – tað er eitt boð.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– Eg haldi ikki at eg eigi nakran pínligan tónleik.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– Eg fari aldrin at royna karaoke.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Friðaligir sangir hjá David Foster, Chicago og Peter Cetera osv.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Ongan.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Eingin tónleikur fær meg i ringt lag. Bert ein sangur, sum eg haldi eitur »Jeg kan en sang der kan drive dig til vanvid.«

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– Ongin.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– Undirfulla land hjá Finnur Hansen.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– Alla Leið, Hundur mín Kingoson og Ommu tíni hjá.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tað havi eg ikki hugsað um. Men »Gakk tú fram við góðum treysti« er góður.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
Dream Theater.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Allar kendar gittarleikarar.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Jógvan H. Gardar – hugoga@online.no
Til: post@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Flúgvandi finni fær norðmenn til at hoppa

Í morgin er tað Kollen-sunnudagur. Fyri føroyingar flest sigur hetta ikki tað stóra, men fyri norðmenn og stórar partar av skíheiminum er hettar dagur tey flestu gleða seg til. Hetta er dagurin tá heimsins bestu skíhopparar og skískjótarar koma til Oslo og luttaka í seinastu kappingini í kappingarárinum.

Í ár rokna norðmenn at teir endiliga aftur skulu kunna vinna hesa kappingina. Seinast var í 1993. Tíggjutúsundtals áskoðarar hava seinnu árini fylgt nøvnum sum finska Janne Ahonen, týsk Martin Schmitt, eysturríkska Andreas Goldberger, japanska Noriaki Kasai og øllum hinum útlendingunum. Norskir hopparar hava í fleiri ár havt trupult við at koma inn millum teir 30 bestu í heiminum. Men nú er vent í holuni. Orsøkin er ein sera fryntligur og lítillátin finni. Mika Kojonkoski hevði møguleikar til at halda fram við at vera venjari hjá heimsins bestu hopparunum. Men hann tók av tilboðnum um at gera gull burturúr norsku grásteinunum. Hann tók við leiðsluni í 2002. Skjótt sóu vit at norðmenn aftur dugdu at hoppa langt, og teir vunnu aftur eina kapping. Hetta kappingarárið sum nú nærkast endanum skuldi vera eitt stig á vegnum móti komandi kappingarárum. Kojonkoski hevði sum mál at norðmenn aftur skuldu vinna nógv næsta kappingarár. Men longu hetta royndarárið 2003/2004 hava norðmenn sett seg á hopptrúnuna. Teir hava vunnið 11 einstaklingakappingar og tríggjar liðkappingar (allar sum hava verið hetta árið), teir hava vunnið týsk-eysturríksku hoppvikuna og teir fingu mínn sann heimsmeistaran í skíflúgving í Planica. Í Planica blivu teir eisini heimsmeistarar fyri lið.

Hesa seinastu vikuna hava hoppararnir verið í Finlandi - heimlandinum hjá Mika - og har vunnu norðmenn báðar kappingarnar - og ikki bara tað teir blivu eisini nummar tvey í báðum kappingunum. Sigursvandu finnarnir kundu bara gleða sum at Mika Kojonkoski hevur eydnast í Noregi. Undir báðum kappingunum sungu áskoðararnir "Mika kom heim, Mika kom heim".

Mika Kojonkoski skal vera í Noregi fram til 2006 - í øllum førum. Og tað kunnu norðmenn vera glaðir fyri. Í morgin kann hann fáa enn ein vinnara. Hvør hesin verður er ikki gott at siga. Norska liðið hevur 5-6 hopparar sum allir eru millum teir 10 bestu í heiminum.

Men tann største vinnarin í morgin er ein ung genta, Annette Sagen. Hon elskar at hoppa á skí. Hon hevur eisini vunnið týsk-eysturríksku hoppvikuna fyri kvinnur í vetur. Í vetur kom hon við einum ynski um at sleppa at royna teir stóru skíflúgvingsbakkarnar. Kappingarleiðslan í norska Vikersund lovaði at hon og hinar genturnar skuldu sleppa at kappast har fyrst í mars í ár.

Hetta fekk gomlu menninar í hoppheiminum til at reisa seg og við reglugerðum og gomlum sannleikum at nokta gentunum at hoppa. Hoppbakkarnir eru fyri rættar menn, og kvinnur eru ikki bygdar til at hoppa ella flúgva. Hetta fekk Annettu Sagen til at fara í hernað móti teimum gomlu monnunum. Herferðin var sum eitt skalvalop, og Sagen fekk stuðul úr øllum krókum av skíheiminum, kvinnurørsluni og øðrum sum ikki duga at síggja hví kvinnur sum vilja hoppa 200 metrar skulu sleppa at gera tað.

Men nei, teir gomlu menninir hava brúkt alla sína orku til at nokta Annettu Sagen at hoppa í teimum stóru bakkunum. Men Annette Sagen hevur bein í nøsini. Hon hevur hoppa í Vikersund-bakkanum, og hon yvirlivdi. Hon hoppað longri enn meginparturin av mannfólkunum sum luttóku í somu kapping.

Í morgin hoppar Annette Sagen enn einaferð í Holmenkollen. Bakkin kallast K120 metrar. Sambært gomlu monnunum hevur hon ikki loyvi at hoppa í bakkum omanfyri K90 metrar.

Kanska vit skuldu sent Annette Sagen til Føroyar at læra føroyskar kvinnur hvussu ein hoppar útí tað. Hugsi fyrst og fremst um fráveruna av kvinnum í politikkinum.




## Hús í Klaksvík til sølu

Ogn á Skáltavegur 11 til sølu um hóskandi boð fæst.

Matr. nr. 1151
Grundøki: 194 m²
Húsini: ca. 60 m² í tveimum hæddum + hjall
Húsini eru bygd í 1954.
Húsini eru úr betongi og klødd við timbur.

**Nærri upplýsingar á tlf. 457791**

Gallarí Jinx

Málningar hjá Lone Mørkøre
sum verða sýndir fram á Gallarí Jinx,
verða nú seldir við góðum avsláttri.

Framsýningin
hjá Lone Mørkøre endar 31. mars

tel 317101 • jinx@jinx.fo




## Kom og njót Suð

Kvinnukórið Suð úr Klaksvík
hevur hesar konsertir:

**15. mars kl. 19**[30] í Gøtu kirkju
**17. mars kl. 20**[00] í Kommunuskúlanum í Tórshavn
**18. mars kl. 19**[00] í Ósáskúlanum í Klaksvík

Á skránni eru kendir sálmar, klassisk stykki, sangir úr sangleikinum »The Sound of Music« og aðrir sangir.

Kórleiðari: Steinvør Fonn
Klaverfylgispæl: Jóhannes Andreasen

*Konsertirnar vara umleið ein tíma*
*Atgongumerki á kr. 50 fáast við dyrnar*

www.sud.hello.to

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

## Sjúkrarøktarfrøðingar

Til sjúklingadeildina á Suðuroyar Sjúkrahúsi verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingi til fast starv við fullari arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 15. apríl 2004.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 29. mars 2004.

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er: Børkuvegur
mánadag-hósdag frá kl. 9-16 620 Runavík
fríggjadag frá kl. 9-12 Tlf. 448480

Vit selja
DAEWOO
Skips motorar

**FRÁ 20 HK TIL 1000 HK**



**GENERATORAR • STÝRIMASKINUR**

**TILBOÐ:**
**320 HK BÁTAMOTORUR**
**Prísur u/mvg 100.000 kr.**

Umboð:
**Thorleif Samuelsen**
Undir Gráasteini 68 • 100 Tórshavn
Tel 317713 • Fartel 283138

## Hús í Klaksvík til sølu

Ogn á Grønabóli til sølu, um hóskandi boð fæst.

Matr. nr. 968
Grundøki: 9042 m² (trøð)
Húsini: ca. 140 m², deilvís í tveimum hæddum + hjall
Húsini eru bygd í 1979, eru úr betongi, tó ein partur úr timbri. Takið tjørupapp.

Húsini standa vakurt við útsýni norður gjøgnum Haraldsund og yvir allan Pollin. Umframt til sethús eru húsini eisini vælegnað til onnur endamál.

Á ognini eru eisini úthús uml. 40 m² og neyst uml. 50 m².

Nærri upplýsingar á tlf. 457791, best eftir kl. 10.00.

## Sethús til sølu



Talan er um eini stór sethús í góðum standi og við fastbygdum bilhúsi. Helmingurin av kjallaranum verður nýttur til vinnuligt endamál. Umhvørvið er barnavinarligt og stutt er til handils og dagstovn.

Alt er liðugt gjørt rundan um húsið.

| | |
|---|---|
| **Adressa:** | Lambagarði 1, 100 Tórshavn |
| **Stødd á húsunum:** | 160 m2 x 2, umframt altan og terassu |
| **Loft:** | Ovasta loft |
| **Miðhædd:** | Køkur/stova, 2 stovur, hjúnarrúm/bað, wc, 2 kømur, wc/bað, gong og gestatoilett |
| **Kjallari:** | Køkur/stova, 2 kømur, wc/bað, gong, 2 stór rúm, kontór og fýrrúm |
| **Stødd á grundøki:** | 504 m2 |
| **Byggiár:** | 1982 |
| **Yvirtøkudagur:** | Eftir avtalu |
| **Kostnaður:** | Hóskandi boð ynskist. |

Áhugað verða biðin um at ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling. Her kunnu vit greiða nærri frá ognini, og avtala tíð at sýna húsini fram.

**Húsamekling**
**Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331, 110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321, Fax 319331,**
**E-mail: protek@post.olivant.fo**
**www.husamekling.fo**
**Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16**